DAGSINS MEINING

Nakað at hugsa um

Leygardagin legði felagið Synergi til brots við sínum fyrsta tiltaki, ein fakfestivalur fyri fjølmiðlar og fjølmiðafólk. Stigtakarinnurnar komu væl frá hesi byrjan, og er lítil ivi um, at hetta verður afturvendandi tiltak og eitt tiltak, ið eisini aðrir fakbólkar kunnu hava gleði og nyttu av.

Hans Engell, ábyrgdarhavandi stjóri á Ekstrablaðnum og ein av teimum, ið hevur verið nógv frammí í orðaskiftinum í Danmark um fjølmiðlar og teirra framtíð og teirra støðu í samfelagnum sum heild helt áhugaverd innlegg. Hann gjørdi rættiliga nógv burtur úr støðuni, ið miðlarnir hava í Danmark, Noregi og Svøríki. Niðurstøða hansara var, at tað almenna har raðfestir fjølmiðlarnar høgt fyri tann týdning hesir hava fyri mál og mentan, orðaskifti, upplýsing sum heild, ja fyri demokratiið. Tískil royna tey at skapa fjølmiðlunum góðar karmar at virka undir. Nakað, sum er ein mangulvøra í Føroyum. Engell helt fyri, tá hann tók samanum: at taka føroyskir myndugleikar ikki annað skinn um bak og geva heimliga fjølmiðlaheiminum betri karmar at virka undir, tá ganga tað bert fá ár og Føroyar gerast nærsagt eitt U-land í miðlahøpi. Og tað kann man sum nútímans og upplýst samfelag ikki liva við.

Danski miðlastjórin nevndi tær almennu skipanir í t.d. Danmark, sum hava tilknýti til miðlarnar, eitt nú ein mediakommissión, ið arbeiðir við miðlaspurningum. Hetta er so so eisini nakað, ið okkara myndugleikar eiga at umhugsa. Ein vandi fyri Føroyar er eisini tørvurin á útbúnum fjølmiðlafólki og somuleiðis eftirútbúgving. Hetta er ein stór mangulvøra og eisini ein hóttan ímóti miðlunum í dag og harvið eisini móti demokratiinum. Eisini her fingu umboðini fyri landsstýrið við sjálvum løgmanni og mentamálaráðharranum á odda nakað at hugsa um. Her má tað almenna vísa størri áhuga og kenna størri ábyrgd. At umboð fyri landsstýrið høvdu valt at vera við kann so takast sum eitt gott tekin. So er spurningurin, hvat ítøkiliga fer at spyrjast burtur úr.

Evnisdagurin nam eisini við spurningar, ið viðvíkja miðlafólki og miðlunum sjálvum, eitt nú hvussu hesi best umsita ta stóru ábyrgd man hevur fingið litið upp í hendi. Her var vístá tørvin á tí so nógv umræddu og eftirspurdu fjølmiðlaábyrgdarlógini og einum etiskum ráð at viðgera miðlaspurningar. Nú var evnisdagurin fyrst og fremst fyri fjølmiðlafólk men við vóru eisini umboð fyri landsstýrið, ið høvdu høvi at líða á og taka til sín bæði atfinningar og góð ráð, hóast tað var gjørt púra greitt, at tað skal vera greiður skilnaður millum miðlaheimin og so tann politiska. Løgmaður ásannaði hetta men helt eisini, at bæði fjølmiðlar og politikarar hava brúk hvør fyri øðrum og vónaði, at tað fer at bera til at virka hvør í sær og saman á einum sakligum og professionellum støði. Hann eins og mentamálaráðharrin mettu ikki, at tíðinar í løtuni góvu rásarúm fyri at stuðla kring miðlarnar so ella so, men løgmaður kundi tó lova, at fjølmiðlaábyrgdarlógin verður veruleiki í næstu framtíð.

Ringar ella góðar tíðir. Okkara politikarar eiga at taka orðini hjá Engell til umhugsunnar og spyrja seg sjálvar, hvussu verður við demokratiinum, um framtíðar karmarnir hjá allari pressuni verða so vánaligir, at úrslitið verður ein veingjaskerd pressa, ið hvørki hevur orku at stuðla undir demokratiseringsprosessina ella stuðla undir mál og mentan.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Einaræðið Føroyar

Petur S. Johannessen
Vágur

Nú tá í vit eftir øllum at døma hava fingið einaræði í Føroyum, er so at spyrja, hvat í hægstu leikmennirnir í landsstýrinum hugsa, tí tað er greitt, at fjølmiðlarnir avgera, hvør situr í landsstýrinum, og hvussi leingi hesir skulu verða har.

Tað bleiv staðfest, tá Jóaness Eidesgaard loysti Johan Dahl úr embætinum sum fiskimálaráðari við tí grundgeving, at hann ynskti arbeiðsfrið, og tískil er Johan Dahl tyngjandi fyri ta sokallaða politisku skipanina, eftir at tað bleiv greitt, at nakrar ógrundaðar blaðgreinir, sum Johan Dahl ikki kan forða nøkrum at skriva, fáa løgmann at fella landsstýrismannin. Hesar greinir hevur Johan Dahl nú afturvíst sum villur heilaspuni.

Ja hetta er ikki Hollywood, men rama álvara, hetta er støðan í Føroyum í dag, hvar eru vit nú henni, eg havi ikki hoyrt líknandi, hetta er púra óseriøst harra løgmaður, og sera vánaligt at tapa fyri einari óseriøsari pressu, sum kanska spælir við heilt øðrum tónum.

Ein vinnulívsmaður kann altíð fara av knóranum, tað skal bert ein nóg stór feilíløga til, so skramblar alt korthúsið, óansæð hvussu væl fyritøkan er fyri, tí meti eg einaferð enn, at tað var sera óheppi at løgmaður segði Johan Dahl frá sum landsstýrismann í fiskivinnumálum, tí tað er fyri mær púra burturvið at koyra hann frá, við tí grundgeving at fáa arbeiðsfrið.

Hvør vinnulívsmaður tímir nú at fara inn í landspolitik, fjølmiðlarnir skulu bert skriva ræðusøgur, so verður hesin landspolitikari tyngjandi fyri politisku skipanina, og hvat hendir so løgmaður?

Eisini er tað sera harmuligt, at løgtingslimir í Sambandsflokkinum ikki standa saman um landsstýrismannin, hesi somu valdu at stuðla tværferðir, har niðurstøðan var, at Johan Dahl skuldi verða umboðið í landsstýrinum hjá Sambandsflokkin, hetta sigur bert, hvussu støðan er í Sambandsflokkinum í løtuni, ein glantrileikur uttan sín líka.

Tað hoyrir ongastani heima at býráðslimir krevja ein landsstýrismann frá, sum einki skeivt hevur gjørt, bara tí tey eru fornermaðl, hvat er hetta fyri nakað, hetta er ikki Mopped Show, hava tey áhuga at verða í landspolitikki er bert at royna at koma á listan til løgtingsvalið.

Tað er langt síðani, at ein samgonga hevur sitið, sum ongan landsstýrismann hevur havt við beinleiðis bakgrund í vinnulívinum, nú eru tað fýra lærarar, ein skrivstovumaður, ein grannskoðari og ein samfelagsfrøðingur í landsstýrinum í dag, ikki tí at eg vil undirvurdera hesar, men eg meti, at balansin ikki er nøktandi, tann vinnuligi parturin er ikki umboðaður, og er tað sera óheppi.

Tað er ógvuliga álvarsamt, um vit í Føroyum fáa tann tendens, at vinnulívsfólk ikki tíma at fara aktivt inn í politik meira, tí støðið er sera lágt í løtuni, so meti eg at vit tapa landsdystin áðrenn hálvleik.

Vælferðarsamfelagið Føroyar!

Svenning Borg
Vágur

Siggi í bløðunum, at Høgni Hoydal fær 116.000 kr. í løn um mánaðin frá tí almenna.

Hugsandi um tey, sum á flakavirkjum og fiskavirkjum stríðast alt árið fyri næstan tað sama, sum hesin almenni garpurin fær um mánaðin, má ein bara øtast. At hettar kann bera til, sigur bara hvat stoðu okur eru í.

Sjálvandi ber væl til at tosa um sjálvberandi búskap við sovorðnari løn, men ikki haldi eg, at lønin er uppiborin!

Skattur og avgjøld kunnu væl brúkast til sovorði, um so figgjarlógin gevur hall.

Talufrælsi við ábyrgd

Súsanna Dam

Romanblaðið Fregnir bar hendan dagin eina sera fantasifulla og hjartanemandi frásøgn, sum bæði almenningur og fjølmiðlar tóku fyri fult, ja so fult at hvør einasta tíðindasending og eykatíðindasending í fleiri dagar høvdu frásøgnina sum høvuðssøgu. Gitað varð dúgliga um avleiðingar og revsing, eins og stór gremjan um skomm og ómoral floymdi oman yvir okkum. Ráðaríkir menn settu knyklar í brýr, sóu týdningarmiklir út og gjørdu metingar um politiskt reinføri og valbæri. Jú vit fingu luftað okkara fordómum og øst hvør annan upp í nánd av kollveltingarfebri.

Romanin hjá Fregnum fekk tó ein bráðan enda og doyði uttan minstu umrøðu, eftir at, ?, . veruleikin varð lýstur, ella kanska tí at endamálið varð rokkið. Kanska varð rættvísið uppfylt, og øll nøgd. Hvør veit?

Men ikki er liðugt enn. Sensatiónsjagstranin heldur áfram eftir einum heimasniðkaðum moralkodeksi, sum ilt er at skoða nakað dygdargott ella hóskiligt við, og lukka fatti hann, ið av onkrari orsøk er farin út um rammurnar, er veiðimaðurin ikki vinur hans.

Mín spurningur sum lesari, lurtari, brúkari er nú, hvat skal hitt fjórða statsvaldið nýtast til? Skal tað kreera mær eina mynd, sum svarar til ta dreymatilveru, sum eg ynski mær? So fari eg kanska at elska tað, í hvussu so er, líka til eg skilji, at tað hevur hildið meg fyri gjøldur. Skal tað siga mær frá dagsins viðurskiftum so nær veruleikanum og so litleyst sum tilber. Tá kann vera, at eg við hvørt fari at hata tað, men eg fái so høvi til sjálv at taka dagar ímillum møguleikarnar. Ella skal tað bara sýna fram vøddar sínar fyri vøddarnar skuld?

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Hví hevur P/F Ítróttarvedding ikki biðið um samstarv við Norsk Tipping og Svenska Spel?

Heri Simonsen

Ein ikki sørt óttafullur stjóri í P/F Ítróttarvedding var at hoyra í ÚF týskvøldið 24. februar.

Altjóða veddingarfyritøkan Ladbrokes hevur opnað eina konto í føroyskum peningastovni, og kann tað gerast orsøk til, at samstarvsavtalan millum Dansk Tipstjeneste og Ítróttarvedding verður uppsøgd. Danir fara at negla fyri hurðina, og ítrótturin, mentanin og ungdómsarbeiðið fara at missa smáar 7 miljónir krónir! Hetta er sjálvsagt ógvuliga harmiligt, um tað kemur so langt. Men áðrenn man heilt missir mótið, átti man kanska at kannað aðrar norðurlendskar samstarvsmøguleikar.

Betri tænastu

Norsk Tipping og Svenska Spel, sum eru almennu veddingarfyritøkurnar í Noregi og Svøríki hava eina nógv betri tænastu fyri tey, sum tippa og oddsa. Í Noregi og Svøríki kan ein vedda uppá "singlir", t.v.s. ein kann vedda útfallið: 1-X-2 uppá bara ein dyst. Ein norskur og svenskur oddsveddari nýtist bara at stríðast við 3 ymisk útfall av veddimálinum. Tað er bert hendingaferð, fyri ikki at siga ongantíð, at vit føroyingar (danir og grønlendingar) sleppa at vedda útfallið: 1-X-2 av bert einum dysti. Hjá Dansk Tipstjeneste er man tvungin at vedda útfallið av í minsta lagi tveimum dystum. Tað merkir, at ein skal stríðast við 9 ymisk útfall. Norsk Tipping og Svenska Spel hava also eina munandi betri tænastu at veita sínum oddsveddarum, enn Dansk Tipstjeneste. Haraftrat hava Norsk Tipping og Svenska Spel - í gjøgnumsnitt - væl hægri odds at bjóða sínum kundum enn danska monopoltænastan. Hetta ger, at nógvir føroyingar heldur vedda á alnótini!

Meira í puljuni

Taka vit klassisku leygardagstippingina, er hópin hugaligari hjá veddarum at tippa leygardagstipping hjá Norsk Tipping og Svenska Spel. Meðan tipspuljan hjá Dansk Tipstjeneste sjáldan klárar upp um 6 miljónir DKK, so liggur norska tipspuljan javnt og samt ímillum 25-30 miljónir NKK. Svenska tipspuljan er eisini væl størri enn tann danska, um ikki líka stór, sum tann norska. Um Dansk Tipstjeneste hóttir tykkum í P/F Ítróttarvedding, so er ein gongd leið at spyrja seg fyri hjá Norsk Tipping ella Svenska Spel, og biðja um samstarv higani. Nógvir føroyskir tippararar og oddsarar, ið heldur vilja vedda hjá einum alnóts-bookmakara høvdu aftur byrja at tippa og oddsa hjá terminalunum hjá P/F Ítróttarvedding, um teir høvdu fingið tey oddsini, og tað tænastuna, sum Norsk Tipping og Svenska Spel hava at bjóða sínum kundum!

Tipsblaðið harðan kritikk

Eingin hevur kritiserað Dansk Tipstjeneste so nógv sum júst Tipsblaðið. Tipsblaðið hevur fleiri ferðir biðið Dansk Tipstjeneste um at spegla sær í Norsk Tipping og Svenska Spel. Men hetta hevur verið sum at sláa ein kodda! Sjálvur tori eg at garantera P/F Ítróttarvedding, at teir høvdu fingið ein nógv størri umsetning, tá ræður um tips og odds, um teir høvdu havt terminalar hjá Norsk Tipping ella Svenska Spel. M.a. íslendska veddingartænastan samstarvar við Svenska Spel á fleiri økjum. Norsk Tipping og Svenska Spel hava líka nógv tóm lottospøl sum Dansk Tipstjeneste so á lotto-økinum hevði P/F Ítróttarvedding ikki mist nakran pening. Spyrjið tykkum fyri hjá Norsk Tipping og Svenska Spel. Føroyar eru sætta norðurlandið, og samvinna okkara eigur at verða við øll norðurlond. Eisini tá ræður um ítrótt og ítróttarvedding. Føroyska veddingarlógin heimilar P/F Ítróttarvedding at velja Norsk Tipping ella Svenska Spel fram um Dansk Tipstjeneste. Í Noregi og Svøríki fara "tipsmidlarnir" eisini til ítrótt, ungdóm og mentan! Ella skal bara alt í Landsuðri liggja?

Vælkomin til Bergen-Belzen, Mr. Down

Jón Ellendersen

Mr. Down var ein sera fryntligur, ungur maður, góður við øll og tað besta hann visti var at geva fólki eitt reiðiligt klemm. Mr. Down var altíð í góðum lag.

Kanska gekk tað ikki so væl í skúlanum hjá Down, hann hevði ilt við at sita stillur og skilti ikki alt, sum lærarin segði. Men øll dámdu Down, øll vóru glað tá Down var í klassanum.

Men Mr. Down visti, at hann var ikki sum øll hini, ella rættari: hann og hansara líkar vóru ikki sum øll hini, men tað vóru jødarnir heldur ikki, so hann helt, at allir Down´arnir vóru eitt slag av jødum, og tí kallaði hann tey fyri Down-Jødar.

Ein dagin bankaðu nakrir búnaðklæddir menn á hurðina og søgdu harðliga, at Mr. Down skuldi koma við, og tað sama skuldu foreldrini. "Tit skulu út at ferðast!"

Mr. Down var í sjeynda himli. Hann hevði altíð droymt um at sleppa at ferðast. Men, tað undraði hann hóast alt, at tokið var so ússaligt, at eingir stólar vóru í vogninum og, at tað luktaði so illa. Í einum króki sat ein kona og græt, hon græt allan túrin. Mamman og pápin søgdu bara, at "tað gongur nokk, Mr. Down".

Tá tokið steðgaði - Mr. Down visti ikki hvussu leingi tey høvdu koyrt - kom ein brískur búnaðmaður, tey søgdu hann var sanitetshermaður - eitt løgið orð. "Tú fert til høgru!" segði sanitetshermaðurin við Mr. Down, "og tit til vinstru!" segði hann við foreldrini.

Mr. Down helt tað vera stuttligt, men helt tó, at foreldrini sóu so kedd út. Tað skilti hann als ikki, tí nú vóru tey komin til ein sera hugnaligan feriubý, Bergen-Belzen, ikki Bergen, sum hann helt mamman og pápin høvdu sagt. Líka mikið, hann kundi fara til Bergen eina aðra ferð. Eftir sum Mr. Down skilti, so var tað eina og aleina tí hann var ein Down´ari, so tað mátti vera okkurt heilt serligt.

Á veg inn í feriubýin fekk Mr. Down eyga á eitt skelti, har tað stóð okkurt sum "Arbeit Macht Frei", men hann skilti ikki orðini, tey vóru fremmand.

Mr. Down legði til merkis, at meginparturin av fólkinum í feriubýnum gingu við gulum stjørnum. Hann vildi eisini hava eina gula stjørnu, men fekk at vita, at har hann skuldi, høvdu tey ikki gular stjørnur fyri neyðini.

Mr. Down fekk at vita, at ein maður sum æt Hitler hevði bygt Bergen-Belzen feriubýin, so Hitler mátti vera ein fittur maður, ein rættiligur jólamaður.

Tað síðsta Mr. Down mintist var, at hann var biðin um at fara í bað. Aldri fyrr hevði hann sæð so stórt baðirúm, har vóru minst 100 brúsur. Mr. Down helt tað vera stuttligt at fara í bað við so mongum í senn, og hann skilti ikki, hví so mong teirra grótu. Heima hjá teimum grótu tey í øllum føri ikki, tá tey skuldu í bað, tí tað var so herligt.

Fyri stuttum sótu vit øll skelkað framman fyri sjónvarpsskíggjan og hugdu at sendingini um svenska rasupolitikkin. øll fólk, sum ikki vóru "av reinari rasu", ella vóru samar, sálarsjúk, menningartarnað vórðu geld so tey aldri kundu fáa børn. Hitler dámdi so væl hesa læru, at hann menti hana, men í staðin fyri at gelda, týndi hann tey ístaðin í stórum týningarlegum: Bergen-Belzen, Buchenwald, Auschwitz og Tre-blinka. Eisini børn og vaksin við Downsyndromi vóru týnd saman við jødunum.

Ja, vit eru skelkað av slíkum tíðindum, men tá vit í Útvarpinum hoyra, at nú skulu allar kvinnur fáa nakkafoldskanningar, tí møguliga bera tær ein Mr. Down undir brósti, og tað kann nýmótans samfelagið, har alt og øll helst skulu vera perfekt og ikki kosta samfelagnum ov nógv, ikki góðtaka.

Men vilja vit, og tora vit at játta fyri okkum sjálvum, at nýggjasta stjørnuskoti úr Danmark ikki er annað enn tað, sum svenska rasulógin og síðani Hitler royndu, at rudda heimin fyri tí óperfekta, at rudda heimin fyri børnum við Down-syndromi og øðrum sjúkum, sum pletta tað perfekta, sum eru ein stór útreiðsla fyri eitt samfelag, sum heldur vil nýta peningin til vælferð (?!?!)

Tora vit? Vilja vit?

Boðskapurin frá vísindini í Keypmannahavn ljóðar øðrvísi, men í roynd og veru, er boðskapurin ikki annað enn søgan um nýggju klæði keisarans. Endamálið er at sleppa av við alt tað óperfekta, sum tyngir heilsuverkið og samfelagið annars. Vit hava brúk fyri "Lebensraum" og einum nýggjum "Endløsung" tí vit vilja vera harrar yvir lívi og deyða, vit vilja skapa tað perfekta mennískjað, tað perfekta, rasureina samfelagið.

Tað syrgiliga er bara, at heimurin verður so óendaliga fátækur og litleysur, sleppa hesir gráu, myrkursins gongumenn at avgera hvussu vit øll skulu vera. Kanska ein gráur, keðiligur massi sum tey sjálvi. Einsrættað, einstáttað og einsporað. Heimurin verður fátækur uttan Mr. Down, sera, sera fátækur. Men íklætt lógina um fosturtøku, er nýggjasta vápnið kanska besta vápnið nakrantíð móti Mr. Down, tí nú er tað umsorganin fyri mammuni, pápanum og hinum systkjunum sum er loysnarorðið.

Hvussu er við umsorganini fyri Mr. Down, tað hugsa hesir gráu menn minni um. Teir kundu kanska eins væl sagt: Væl afturkomin til Bergen-Belzen, Mr. Down.

PS: Her heima kundu vit passandi vígt Trælanýpuna av nýggjum.

Fortíðin & Nútíðin & Framtíðin?

Hans Birgir Hansen
Íverksetari í føroyskum bløðum

Tað hevur støðugt gingið framá tá ein fær klára upp við sína fortíð og nútíð og skapað framtíðina og fáa skipað seg heilt av nýggjum tá ein sleppur sær av við óviðkomandi fólki!

Eg eri stak væl nøgdur við framgongd, trivnað, menning, ið ein hevur skapt við hjálp av lesarabrøvum í føroyskum bløðum í meira enn ein mansaldur ið hevur gjørt støðuna greiðari!

Tað hevur kostað einum ómetaliga nógv í peningi, orku og tí, at vinna sær størri sjálvsavgerðarrætt, frælsir, rættindir, privatlívsfriðin, tryggja ímóti, óviðkomandi uppíleggjanir!

Eg havi hópin av ættarbólkum, stættum, ið royna at avleiða eina hugsanir og órógva eins forrætningsvirksemi og dagliga samskifti, samstarvi, við onnur medmenniskju, í dag!

Tað er veruligur hatur, óndskapur, øvundsjúka, ættarbólkar, stættir dagliga sýna mær, allastaðni í Havnini, ið leggja seg út í privatviðurskiftir hjá einum, ið ikki viðkemur teimum!

Eg havi skyldu at hjálpa øðrum, ið eru undir skaðiligari ávirkan av mínum etableraðu kappingarneytum, teimum ið eru óseriøs, óvirkin, ómotiverað, í tí dagliga gerandislívið!

Tað er neyðugt at halda áfram við sínum stríðsætlanum og fylgja upp tað, ein hevur skrivað og viðgjørt í lesarabrøvum, í bløðunum og geva øllum innliti, forstáilsi, tilvitanina!

Eg fái positivar reaktiónir frá fólki, og ein fær forbedra sítt bakland og etableringar, so ein fær skipað seg sjálvstøðugan og sjálvstøðugt vinnurekandi heimaníframa revagarðinum.

Tað at kunna hjálpa fólki ið eru seriøs, virkisfús, motiverað, í tí dagliga gerandislívi, tað er hvat ein fæst við og kunna um ymiskar mirakulkurar, ið ein hevur fingið roynt heima.

Eg havi góð kort á hondini so ein verður rættuliga væl fyri at taka upp kappingina við etablerað kappingarneytar, tá talan er um fólkaheilsuna, náttúruna, orkusparing v.m.!

Tað er gott at vera sjálvlærdur í mest sum øllum ið ein dagliga fæst við at eygleiða, filosofera, granska, lesa, royna, ið ein síðani fær kunnað í lesarabrøvum í bløðunum í Havn.

Eg havi fleiri stórar lívsavbjóðingar fyri framman við atliti fleirtjóða fyritøkur í ein hevur gingið undan at slóða fyri ið komnar eru á privata heimamarknaðin í Føroyum.